## Hanna Dalsenni tikið seg av Fólkaflokslistanum

Eitt av kvinnuligu valevnunum hjá Fólkaflokkinum í Norðuroyggjum, Hanna Dalsenni, boðar nú frá, at hon hevur tikið seg av listanum til løgtingsvalið. " - Eg havi gjørt av at taka meg av listanum hjá Fólkaflokkinum til komandi løgtingsval. Men eg ynski flokkinum eitt gott val" , skrivar hon á heimasíðu síni HYPERLINK "http://www. hannadalsenni.dk" www.hannadalsenni.dk. Sambært Regini Dalsgaard á skrivstovuni hjá Fólkaflokkinum stillar Elisabeth G. Hansen upp fyri flokkin í Norðoyggjum. Hon býr í Klaksvík er nevndarlimur í Norðoya Fólkafloksfelag.



## Jólasangløta í Kelduni

Tað er vorðin fastur táttur í Kelduni í Skálafirði at syngja jólini inn tollaksmessudag. Soleiðis verður aftur í ár. - Aftan á tey seinastu jólainnkeypini og resið, sum er til jóla, bjóða vit øllum vælkomin til at slappa av við einari hugnaligari sangløtu saman við okkum, siga tey úr Kelduni. Tey fara at syngja kendar og nýggjari jólasangir. Ymiskar sangkreftir luttaka, Kvartettin í Betesda, Lisa Frederiksberg, Terji Vestergaard, Eyðun og døtrar, Lovsangskórið í Kelduni, o. o. Eisini verður dansiframførsla, og sum altíð verður eisini kaffi á skránni. Eins og undanfarin ár hav tey eina innsavnan til missión. Songløtan verður sunnukvøldið 23. desember kl. 21:00.

# igari órøkt





*Nena Thomsen í ein av niðurslitnu skúlastovunum, har ein einsamallur lærari hvønn dag hevur alla ábyrgd av fýra børnum við serligum tørvi. Eingir pengar eru til umvæling, nýggja útgerð ella læraraavloysarar*

- Jógvan á Lakjuni var sera jaligur, og hann tóktist at vera kløkkur av, at umstøðurnar vóru so vánaligar. Og vit fingu lyfti um, at hann skuldi søkja fíggjarnevndina um økta játtan til tríggjar læraralønir umframt pengar til rakstur av svimjihylinum.

Nena var glað og spent, tá hon fór av aftur fundinum, og hon gjørdi ikki mætari enn at hon ringdi beinanvegin til Annfinn Kallsberg, formann í fíggjarnevndini, og greiddi honum frá málinum og segði, at Landsstýrismaðurin fór at søkja um økta játtan. Hetta var klokkan hálvgun trý seinnapart.

Beint áðrenn miðnátt sama kvøld slitnaði samgongan, og alt fór í vaski.

- Nú kann tað aftur taka drúgva tíð, til vit fáa myndugleikarnir at síggja tørvin og gera nakað við støðuna, sigur forkvinnan í stýrinum á niðurslitna skúlanum.

### Mugu berjast og stríðast

Í løtuni fer umbygging fram á skúlanum, har B-lonin verður útbygd við 120 kvadratmetrum, sum skulu brúkast til skúlastovur til børn við autismu. Og gamli, kaldi bussurin skal eisini útskiftast.

- Hetta eru vit sera fegin um, sigur Hallur, men hann leggur eisini herðslu á, at útbyggingin er eitt úrslit av, at foreldur hava pressað.

- Tíverri er tað so, at einki hendur, um foreldrini ikki sjálvi berjast fyri tí, staðfestir Nena.

- Ongar yvirskipaðar ætlanir og visiónir eru. Og framstig henda bara, tí onkur foreldur orka at stríðast. Men tað eru langt frá øll, sum orka tað. Tey flestu hava nokk í at fáa dagin at hanga saman, tí eitt barn við menningartarnað krevur nógva orku.

- Tí er tað ikki so løgið, at tey flestu ikki eisini orka at berjast við myndugleikarnir, sigur Hallur.

Nena, Ester og Hallur leggja dent á, at tey starvsfólk, sum eru á stovninum gera eitt stórt og gott arbeiði.

- Tey royna at gera teirra besta, men tað má vera frustrerandi at standa sum einsamallur lærari hjá fýra serliga strævnum børnum og vita, at um tú ikki fert til arbeiðis, so fáa starvsfelagarnir tað upp aftur strævnari, sigur Nena Thomsen.

Miðalaldurin á lærarunum er eisini hægri á Skúlanum á Trøðni enn á øðrum stovnum, tí ungir lærarar støðast ikki í arbeiðsumstøðum, har tey ikki kunnu geva tað tey ynskja, har eingir pengar eru til starvsfólkamenning og har bygningurin far loyvi at fara í hundarnar, uttan at nakað hendir.

**Viðgerðin heldur fram í blaðnum í morgin**



*Fimleikarahøllin stendur eisini í hálvum gekki, har loftslistar hanga leysir og veggir eru hálvgjørdir*